


*Ein stórur partur av stovuni eru úr glasi. Hetta ger hana ljósa - og heita um summarið, og heldur kalda um veturin*

# Passivhús við virknari orku




*- Vit brúka bert helvtina so nógva orku sum eini vanlig sethús, sigur Stein Stoknes, sum bygdi fyrstu passivhúsini í Oslo. - Eg vænti, at hetta er framtíðin*

**HÚSABYGGING** – Nú høvdu vit búð 20 ár í eini íbúð. Eg helt tí at stundin var komin til at byggja okkara egnu hús, sigur norski sivilverkfrøðingurin, Stein Stoknes. - Ja, eg havi faktisk altíð droymt um at kunna byggja míni egnu orkuvinarligu hús her í Oslo.

Snorri Brend

**Noreg:** Tað hendi so knappliga, at eitt grundøki við súreplatrøum og runnum var til sølu í nánd av, har hann búði saman við familju síni.

Hetta var snøgt sagt staðið til at byggja eitt umhvørvisvinarligt passivhús, sum hann so leingi hevði droymt um.

– Ætlanin var at byggja tað og fáa tað liðugt eftir einum ári, sigur Stein Stoknes við norskar miðlar.

Tað skuldi kortini taka honum samfull fimm ár. Í fjør var húsið so-mikið liðugt, at tey kundu flyta inn, hóast alt ikki er gjørt innanveggja.

Hesi fimm árini hava fólk manga staðni frá verið og vitjað hjá Stein, millum annað norski olju- og orku-málaráðharrin.

– Eg haldi, at her munnu hava verið eini 1500 fólk á gátt, sigur Stoknes við einum brosi.

### Bjálving

Uttan at fara ov nógv inn í tær tøkniligu útgreiningarnar, kann í stuttum verða nevnt, at hann millum annað hevur eina 40 millimetur tjúkka bjálving.

> **Eg eri jú idealist**

## Fakta

**Passivhús**

Eitt heiti sum kemur úr Týskalandi, fyri at flokka hús við munandi lægri orkunýtslu enn vanligu sethúsini - í miðal ein sparing uppá 25 prosent Lága orkunýtslan ger, at tað er óneyðugt við umfatandi hitaskipanum Fyrr í ár varð ein líknandi standardur gjørdur í Noregi. Her verður sligið fast, at orkunýtslan til upphiting av bústøðum má í mesta lagi vera 15 kilowatt-tímar fyri fermeturin, alt eftir húsaslagi og hvar ein býr Orðið "passiv" merkir, at ein skal hava ein góðan bygningskropp, har orkunýtslan verður hildið niðri við hjálp av passivum tiltøkum, sum bjálving, tettleika og endurnýtslu av hita.

– Tjúkdin á veggjunum merkir í roynd og veru, at vit missa eitt sovikamar í gólvvídd. Men vit hava framvegis nóg mikið av plássi her inni, sigur hann.

Meginparturin av stovuni er gjørd sum vindeygu, sum eru sera væl bjálvað. Hetta ger at húsfólkið ikki hevur fyri neyðini at brúka aðrar orkukeldur enn ta vatnbornu, sum er á gólvinum í baðirúminum og gongini.

Seinasta vetur bar ikki til at halda hitanum á hóskandi støði í húsinum, og tí mátti familjan Stoknes útvega sær ein panelovn í hvørjari hædd. Ætlanin er at keypa eina peis einaferð seinni.

### Idealisma

Hinvegin hevur hetta ikki forðað fyri, at tey hava spart nógva orku. Eitt slíkt passivhús brúkar millum 65 og 75 prosent minni orku enn eini miðalhús.

– Eg rokni kortini við, at tað fer at taka nøkur ár til vit hava spart hesa rættiliga stóru íløguna inn-aftur. Men eg hugsi eitt sindur longur fram enn tað, tí eg ivist onga løtu í, at hetta slag av húsum verða nógv eftirspurd í framtíðini.

– Eg eri jú idealist. Skuldi eg hugsað handilsligt, hevði eg ikki bygt júst eini slík hús. Fyribils eru onkrar forðingar í lógarverkinum, og tær fíggjarligu rammutreytirnar eiga at gerast betri, heldur Stein Stoknes.

Í dag eru fólk vorðin alt meir áhugað í at búgva og liva grønt, og fleiri byggifyritøkur gera nú lykklaklár passivhús.

– Enn er hetta nýtt, men eg valdi at fylgja dreymi mínum. Tað kennist gott at búgva soleiðis. Hetta er ein smartur máti at byggja uppá, og vit eru væl útgjørd til framtíðina.

> **Enn er hetta nýtt, men eg valdi at fylgja dreymi mínum. Tað kennist gott at búgva soleiðis**

> **Eg haldi, at her munnu hava verið eini 1500 fólk á gátt**